# Sersáttmáli millum

**P/f Thor Fisheries**

Og

**Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

Viðvíkjandi m/s Hoyvík, TN 90

Millum omanfyri nevndu partar er í dag gjørd henda semja:

Manningin á Hoyvík skal avroknast soleiðis:

1. Tá skipið fiskar ídnaðarfisk í Norðsjónum, skal skipið ganga eftir sáttmálaásetingunum fyri ídnaðarskip – í løtuni við einum býtisprosenti á 27,0.
2. Tá skipið fiskar makrel, sild og svartkjaft, skal skipið ganga eftir sáttmálaásetingunum fyri nótaskip – í løtuni við einum býtisprosenti á 17,5.
3. Semja er um, at reiðaríið rindar feløgunum avgreiðslugjald fyri sáttmálan, svarandi til limagjaldið hjá hvørjum einstøkum felag.
4. Viðvíkjandi felagsfisking ella "joint fishing" (partroling ella fiskiskip/móttøkuskip) skal býtast soleiðis, at Hoyvík í mesta lagi fær 70 prosent av avreiðingarvirðinum.
5. Felagsreglurnar í høvuðssáttmálanum millum manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag eru galdandi.

Hesin sersáttmáli er galdandi til ársenda 2017.

Hesin sersáttmáli er skrivaður í trimum eintøkum – eitt til hvønn partin.

Tórshavn 6. januar 2017

**Maskinmeistarafelagið**

Páll Hansen, formaður

**p/f Thor Fisheries**

Hans Andrias Frímann Kelduberg

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

Annfinnur Garðalíð, formaður